Eg elski av hjarta

       F                                  Bb           F
1/4. Eg elski av hjarta hin ellgamla sang,
F                                               C7
Tann songur er nýggjur hvønn dag.
          F                          Bb              F
Hann tónar av himli, um leiðin gerst trong,
F                    C                F
Tí syngur nú sál mín so glað.
          F7      Bb                                 F
          Tann songur er nýggjur hvønn dag,
          F          G                          C7
          Meðan tíðin hon rennur avstað.
                    F                              Bb           F
          Hann kærur mær er, meg til himmalin ber.
          F                        C7                       F
          Tann songur er nýggjur hvønn dag.

2/4.  Tann songur kom til mín, tá bundin eg lá,
Í iva og ræðslu á nátt.
Sum eingil av himli, hann kom til mín tá,
Og setti í fríheit meg brátt.

3/4.  Eg hoyri tann songin, tá freisting er nær,
Hann gevur í hjartanum ljóð.
Hann minnir um klettin, sum bjargaði mær,
Um frelsarans reinsandi blóð.

4/4.  Tá eg gjøgnum deyðsdalin einaferð skal,
Og lívssólin her fer í kav.
Við loystari tungu eg syngja skal tá,
Um Jesus, sum frelsu mær gav.